BERG MOTORS & mazda

Síðan 1968 hava vit innflutt Mazda bilar í stórum nøgdum beinleiðis frá verksmiðjuni í Japan.



Vit hava stóra og fjølbroytta goymslu av nýggjum Mazda bilum, ið vit fara at selja. Somuleiðis eykalutir



Vit fara framvegis at veita ta góðu tænastu, sum okkara kundar bera boð um.



Viðvíkjandi garanti, so fylgir tað bilinum, og fara vit framvegis at greiða hetta fyri tygum.



Tygum kunnu sostatt trygt keypa Mazda bilar frá okkum.





Verið vælkomin

BERG MOTORS

STARAVEGUR 1-3 • TEL 31 35 35 • FAX 31 77 35 • WWW.BERGMOTORS.FO




KlarineTTour Føroyar 2004:

# Klarinettorkestur á konsertferð kring landið



**Føroya Klarinett-orkestur er í hesum døgum á konsertferð, í Vági, Húsavík, Sørvági, Tórshavn og í Fuglafirði verða konsertir við fjølbroyttari skrá**

KONSERTFERÐ
*Tíðindaskriv*

Konsertferðin - *KlarineTTour Føroyar 2004, úr suðri í norð* - byrjaði á Jóansøkuhaldinum í Vági, har fyrsta konsertin var sunnukvøldið og endar á Varmakeldustevnuni í Fuglafirði leygarkvøldið komandi. Á ferðini verða konsertir í Húsavík týskvøldið. Haðani verður farið til Sørvágs, har konsert verður hóskvøldið. Eisini á Jazz-festivalinum verður høvi at hoyra klarinettorkestrið, tí fríggjadagin spælir orkestrið í gongugøtuni.

Leikskráin er fjølbroytt. Har verða klassisk løg at hoyra, har verða kend pop løg, sum eru útsett fyri orkestur. Onkur »evergreen« er eisini á skránni, eins og sálmaløg, vøgguvísa og fosturlandssangir. Á konsertunum verða framførslur har klarinettorkestrið spælir einsamalt, men eisini verða løg, har ein rytmubólkur er við.

Í klarinettorkestrinum eru vanligar klarinettir - tær sonevndu B-klarinettirnar. Men harafturat eru fleiri klarinetsløg, sum ikki hava verið so vanlig í Føroyum. Soleiðis er piccoloklarinettin, ella Ess-klarinettin, við, og eisini eru »djúpar« klarinettir við, bæði altklarinett og kontrabasklarinet.

So ikki kann sigast annað enn at her er eitt orkestur, har klarinettin kemur til sín rætt og har møguleiki er at uppliva, hvussu fjølbroytt og spennandi hetta instrumentið er.

Tey sum spæla í Føroya Klarinettorkestri eru næmingar úr Føroya Musikskúla í aldrinum 14 til 19 ár. Orkestrið bleiv sett á stovn fyri umleið 3 árum síðani. Leiðari er Peder Riis-Jensen.

Konsertskráin er henda:
Týsdagin 29. juni
kl 19.00: í Húsavík, í kirkjuni. Eftir konsertina verður tónleikur og kaffi í ungmannafelagshúsinum.
Hósdagin 1. juli
kl 19: í Sørvági, í skúlanum
Fríggjadagin 2. juli
kl. 15.30: í Tórshavn, í gongugøtuni á Jazz-festivalinum
Leygardagin 3. juli
kl. 11.00: í Fuglafirði, í kirkjuni
kl. 14.00: í Fuglafirði, á skúlanum til málningaframsýning í fimleikarhøllini.

Konsertirnar eru allar ókeypis.



## Stór kórvitjan í juni

Leygardagin komu tvey stór kór til Føroya. Talan er um íslendska Kór Langholtskirkju og danska Tritonus, sum verða roknað millum frægastu norðurlendsku kórini. Tey fara at syngja hvør sær og eisini sum stórt felagskór, við eini 80 sangarum tilsamans.

Kórstevnan er ein liður í tiltakinum Nýggjur Norðurlendskur Kórtónleikur, eisini nevnt NNK, sum kórið Tritonus tók stig til í 2002. Ætlanin er, at eitt danskt, eitt íslendskt og eitt føroyskt kór skulu hittast trý ár á rað og framføra nýskrivaðan danskan, íslendskan og føroyskan kórtónleik. Tónleikurin skuldi verða kirkjutónleikur. Fyrsta árið var tiltakið hildið í Reykjavík, í fjør í Keypmannahavn og í ár verður tað so í Føroyum.

Føroyska kórið, sum luttekur í tiltakinum, er kamarkórið Skýrák, sum er stjórnað av Kára Bæk.

Kári Bæk hevur eisini skrivað føroysku verkini, John Høybye hevur skrivað tey donsku, meðan Tryggvi Baldvinsson, Bára Grimsdóttir og Hildigunnur Rúnarsdóttir hava skrivað hvør sítt av teimum íslendsku. Øll verkini eru skrivað útfrá Bíbliutekstum.

Mánakvøldið 28. juni kl 19.30 fara kórini at syngja hvør sína skrá í Vesturkirkjuni. Mikukvøldið 30, juni kl 19.30 verða kórini at hoyra í Gøtu Kirkju, og her verða nýggju verkini fyri fyrstu ferð at hoyra.

**eys**


